# EB/Streymur tók ikki av



**Í HORNATØKUM**

*Gudmund Nielsen (tv.) og Jóhan Petur Poulsen í hornatøkum*

**Sundalagsmenn tóku ikki av møguleikunum, tá teir spældu javnleik, 1-1, ímóti B68 á Svangaskarði mánakvøldið. Úrslitið hevur við sær at EB/Streymur missir tíðandi stig í oddastríðnum, meðan toftamenn halda frástøðu frá botnstríðnum**

Ólavur Øre Hansen

Ein sigur var eitt ófrávíkiligt krav hjá sundalagsmonnum, um teir skuldu fylgja við sigursvandu runavíkingunum í oddastríðnum. Tískil er javnleikurin ímóti toftamonnum ein strika í roknskapinum hjá EB/Streymi, sum nú eru níggju stig aftanfyri NSÍ á fyrsta plássi.

Av tí sama er tað væl skiljandi, at tey iðra seg um javnleikin í Sundalagnum. Ikki minst tí at EB/Streymur hevði neyðugu møguleikarnir at skora fleiri enn tað eina málið í dystinum, men neyvleikin manglaði.

## Ónøgdur Bill

Men tað eru ikki bert sundalagsmenn sum iðra seg um úrslitið. Venjarin hjá toftamonnum er heldur ikki nøgdur við eina stigið.

-Nei, hetta eina stigið fáa vit ikki brúkt til nakað nevnivert. Vit liggja í einum ongamannalandi, og skuldu hava øll stigini fyri at halda sambandið við liðini omanfyri okkum, segði Bill Mc Leod.

## Rótut og intenst

Samanumtikið er javnleikurin ikki heilt av leið, tí talan var ein ein rótutan og intensan dyst, og av tí sama høvdu liðini trupulleikar at mynda dystin. Somuleiðis var lang millum opnum møguleikunum. Tó so, sundalagsmenn høvdu teir flestu kjansirnar, og tí er eina stigið nokk ein herskin biti at svølgja fyri sundalagsmenn, sum mistu tíðandi stig í oddinum, meðan B68 heldur frástøðu frá botnliðunum.

## Stutt millum málini

Tað vóru gestirnir, sum løgdu betur frá landi, og longu í triðja minutti hevði Arnbjørn Hansen ein líkinda møguleika, men skotið hjá honum fór omanfyri.

Dysturin var merktur at nøgvum nærdystum, og miðskeiðis í fyrra hálvleiki mátti Arnbjørn Hansen berast av vøllinum við skaða í nøsini, eftir ein nærdyst við Odd Højgaard. Báðir spælarnir máttu ein túr á skaðastovuna, men sum skilst var einki álvarsligt áfatt.

Stutt fyri hálvleik bragdaði hjá EB/Streymi, tá teir fingu brotspark, sum Daniel Udsen setti trygt í netið. Men í yvirtíðini í fyrra hálvleiki, fekk Ndende javnað, tá hann stútaði bóltin í netið, eftir innlegg frá Keita.

Seinri hálvleikur minti nógv um tann fyrra. Lítið samanhangandi spæl og fáir møguleikar. Tó royndu sundalagsmenn at trýsta, og eitt nú hevði Gudmund Nielsen eina skotroynd sum brast í tvørtræið, men inn vildi bólturin ikki.

## Rættvíst úrslit

Sostatt endaði dysturin við javnleiki, 1-1, sum nokk var eitt rættvíst úrslit. Sundalagsmenn eru sjálvandi ikki nøgdir við eina stigið, men tá teir ikki megna at umseta møguleikarnir til mál, so verður trupult at vinna dystir. Vi eina stiginum í skjáttuni, halda toftamenn frástøðu frá botnstríðnum.

*hansenolavur@hotmail.com*



**Heðin Askham:**

## -Hetta er ein katastrofa

Sundalagsmenn høvdu møguleika at koma ájavnt HB á øðrum plássi, um teir væl at merkja vunnu á B68, og Heðin Askham var heldur ikki nøgdur við bert at fáa javnleik á Svangaskarði.

-Nei hetta var ein katastrofa fyri okkum. Vit vistu at tað fór at vera trupult, men vit høvdu nokk av kjansum til at avgerða dystin. Tískil er tað ikki nøktandi, at vit bert fáa javnleik, segði ein sera vónsvikin EB/Streyma venjari eftir dystin.

### Trupult at fáa NSÍ aftur

Spurdur um javnleikurin hevur køvt FM vónirnar í sundalagnum, sigur Heðin, at tað verður trupult nú, men teir fara at spæla sín kjans.

-Nú eru vit níggju stig aftanfyri NSÍ, men vit eru í somu støðu sum undan dystinum móti B68, har hvør dystur er ein finala fyri okkum, og tað einasta vit kunnu gera, er at vinna okkara dystin, so fáa vit at síggja hvussu langt tað ber, sigur Heðin.

Sundalagsmenn skulu aftur í eldin 20. August, tá teir skulu á vitjan við Løkin, har oddaliðið NSÍ tekur ímóti.

## B68 – EB/Streymur
1-1 (1-1)

**0-1: Daniel Udsen, 43. , br**
**1-1: Ndende, 45.**
Dómari: Eiler Rasmussen

**B68:** Petur Meinhard Magnussen (Vlada Filipovic, 63.) - Niklas Joensen, Jóhan Dávur Højgaard, Oddur Højgaard, Øssur Hansen (Jónleif Højgaard, 77.) - Jóhan Petur Poulsen, Remi Langgaard, Ndende Adama Guéye, Pól Jóhannus Justinussen - Kristian Anton Andreasen, Ahmed Keita
***Gult kort:*** Ndende Adama Guéye, Remi Langgaard, Jóhan Dávur Højgaard
**EB/Streymur:** René Tórgarð - Gert Hansen, Egil á Bø, Marni Djurhuus, Leif Niclasen - Gudmund Nielsen (Arnar Dam, 64.), Sorin Anghel, Pauli G. Hansen, Brian Olsen (Kristoffur Jakobsen, 88.), Daniel Udsen - Arnbjørn Hansen (Hans Pauli Samuelsen, 34.)
***Gult kort:*** Gudmund Nielsen, Marni Djurhuus, Pauli G. Hansen